# Hergerð Joensen 65 ár



Leygardagin 10. november verður Hergerð Joensen bioanalytikari í Havn 65 ár.

Hergerð Joensen er seinnu árini mest kend sum listakvinna og fyri framsýningarnar, sum hon eitt nú hevur í Smiðjuni í Lítluvík. Hergerð er ikki bert listakvinna, hon er útbúgvin laborantur og hevur starvast sum laborantur á Landssjúkrahúsinum í yvir 40 ár.

Hergerð hevur altíð havt áhuga fyri málningalist og hevur sýnt framsýningum hjá øðrum listafólkum stóran áhuga. Seinastu árini hevur hon sjálv tikið pensilin í hond, og væl liggur fyri. Hon hevur bæði luttikið við málningum sínum á framsýningum saman við øðrum og havt fleiri sjálvstøðugar framsýningar.

Tey sum eru blóðdonorar hava lagt til merkis mongu málningarnar hjá Hergerð í Blóðbankanum á Landssjúkrahúsinum, har hon starvast. 30. november 2007 er seinasti arbeiðsdagur hjá Hergerð á Landssjúkrahúsinum. Í hesum sambandi fer Landssjúkrahúsið at skipa fyri móttøku fyri henni, tá hon gevst.

Hergerð málar bæði naturalistiskt og abstrakt. Í fleiri ár hevur hon luttikið á listaskeiðum í Danmark, ofta í Holbæk. Hon hevur atelier í kjallaranum heima við hús, har hon brúkar tað mesta av síni tíð til málningalistina.

Hergerð er ættað úr Fuglafirði og hevur verið búsitandi í Havn í meiri enn ein mansaldur.

Foreldrini hjá henni vóru Herborg og Jóhan Joensen í Toftum í Fuglafirði. Hergerð er gift við Líggjasi Joensen, sum er gøtumaður. Foreldrini hjá honum vóru Hanna og Leon Joensen.

Hergerð og Líggjas eiga trý børn: Heðin, Joan og Herborg, sum øll búgva í høvuðsstaðnum. Hergerð er sera familjukær og gongur høgt upp í ommubørnini, sum eru fimm í tali.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Eyðálvur Mikklesen í Tórshavn** andaðist mikudagin, 81 ára gamal.

**Elisa Mathilda Joensen**, vanliga nevnd Lisa hjá Skós, úr Klaksvík. Andaðist mánadagin, 80 ára gomul á Norðoyar Røktarheimi. Kistan fer úr kapellinum í kirkjuna fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13.30.

# Bjørg liðug við starvsvenjingina



*Bjørg Jarnskor veit nú meiri um, hvussu eitt nútíðar miðlahús arbeiðir*

Fríggjadagin endaði starvsvenjingin hjá 10 flokki í Fuglafjarðar skúla. Næmingarnir hava verið á ymiskum støðum, eisini her á Sosialinum.

Í starvsvenjing her á blaðnum var Bjørg Jarnskor úr Norðragøtu. Hon hevur í fyrstu syftu sæð, hvussu eitt blað verður framleitt, hvussu ein nýggj útvarpsrás arbeiðir og hvussu arbeiðið verður skipað í einum nútíðar miðlahúsi.

Bjørg hevur sjálv skrivað greinir í blaðið, og hevur lagt fleiri tíðindastubbar út á heimasíðuna planet.fo.

Í dag byrjaði so skúladagurin aftur hjá Bjørg og hinum næmingunum í flokkinum.

Takk fyri hesar tvær vikurnar, Bjørg.

**sb.**

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaðu foreldur

**Rosa og Ditleif Eldevig**
Fuglafjørður

doyðu og vórðu jarðað.
Takk fyri forbønir, vitjanir og annan stuðul í hesi sváru tíð.
Ein serstøk tøkk til syskinabarnið, Poul Færø, fyri umsorgan.
Tykkum, sum hjálptu til á vanlukkustaðnum, starvsfólki á Landssjúkrahúsinum, familjuni og heimbygdarfólki, bera vit eina hjartans tøkk.
Eisini takka vit hjartaliga fyri blómur, kransar og gávur til Siloa.

*Vegna familjuna*
**Mariann, Elisabeth, Kristian, Pól, Anna og Rita**

## Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaða og kæra mamma, kona, omma og vermamma

**Berith Joensen**
Froðba

andaðist og varð jarðað.
Stóra tøkk fyri tær mongu heilsanir og til tykkum í bindiklubbanum fyri hjálpina til ervið.
Tøkk til familjuna fyri hjálp og stuðul, tíðina mamma lá so sjúk. Og til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsið, fyri tykkara stuðul og røkt tíðina hon lá har og at tit gjørdu tað møguligt hjá henni at koma til Froðbiar at vitja aftur.
Tøkk til heimasjúkrasystrar og tykkum, ið vitjaðu mammu, bæði á sjúkrahúsinum og heima.
Tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og gravara.Tøkk til Jónsvein Bech, prest, fyri kenslurík orð og góða talu í kirkjuni.
Tøkk til Randi Nolsøe fyri tann vakra sangin.
Tøkk fyri blómur og kransar, heilsanir og peningagávur og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað á fold.

*Familjunnar vegna*
**Marit, Erling, Poul og Ingi**

**Dagurin**
**9. november. Teodor**, deyður umleið ár 300. Ungur rómverksur hermaður, sum var vorðin kristin. Hóast tær atsóknir, Diocletianus gjørdi at teimum kristnu, helt hann fast við trúnna. Hann setti eld á eitt skurðgudatempul í Róm og varð tikin av døgum.

**10. oktober. Luther**. Sjálvandi ikki komin í álmanakkarnar sum halgimenni, men dagurin er í luthersku kirkjuni settur sum minningardagur hansara. Hann varð borin í heim 10. november 1483 í Eisleben í Týsklandi.

**11. november. Mortansmessa.** Til minnis um biskupin Martin í Tours í Fraklandi. Hann var føddur í tí, sum nú verður rópt Ungarn. Sum pápin var hann fyrst hermaður, men gav seg ungur í kirkjuliga tænastu, har hann skjótt kom fram. Hann var kosin til biskup í Tours